# FUNDARBÓK HJÁ
# VÁGS BÝRÁÐ 2014

| | | |
|---|---|---|
| **Fundur nr. 9**<br>**Tíð:** 27. oktober 2014, kl. 19.00<br>**Stað:** Kommunuskrivstovan | | **Skrivari:** Petry Joensen |
| **Fastir fundardagar:**<br>28. januar, 17. februar, 17. mars, 28. apríl, 26. mai, 23. juni, 25. august fl. 8. september, 29. september, 27. oktober, 24. november, 15. desember | **Møttir:**<br>Allir Býráðslimir | **Ikki á fundi:** |

**1) Mál nr.: 14/00261** Møguligt keyp av ogn til víðkan av Kirkjugarði í Líðini.

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmæli frá fíggjarnevndini, um at keypa ognina matr. nr. 622 b inni í Líðini sum er grannaogn til kirkjugarðin. Soleiðis at kommunan kann víðka um kirkjugarðin einaferð í tíðini.
Eigararnir hava í skrivið játta, at tey eri sinnaði at selja fyri ein prís uppá 75,60 kr. pr. fermetur ella samlað 322.358,40 kr. fyri stykkið uppá 4.264 fermetrar. Eigararnir vísa á, at eitt matr. nr. á Eiðinum somuleiðis eitur 622b og má hetta frámatrikulerast um semja fast um keyp/sølu.
Fíggjarnevndin mælir somuleiðis at upphæddin verður goldin yvir tíð, eftir avtalu við eigarar.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt, at beina málið aftur í Teknisku nevnd. Hetta fyri at kannað eftir um prísurin er í tráð við galdandi ásetingar hjá Búnaðarstovuni.
Eisini verður kannað eftir hvat prísurin var seinast kommunan ognaði sær lendi til víðkan av kirkjugarði.

**2) Mál nr.: 14/00109** Sáttmálin um Suðuroyar Barnaverndartænastu

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram til umrøðu málið viðv. sáttmálanum um Suðuroyar Barnaverndartænastu. Vágs kommuna hevur í skrivið dagfest 25. juni 2014 heitt á Suðuroyar Barnaverndartænatu um at fáa endurskoða samstarvsavtaluna, vísandi til §7 stk. 2.

**Avgerð:**
Hendan samstarvsavtalan hevur bert virka í eitt ár, hetta er kanska nakað stutt skotbrá til ítøkiliga at siga hvat ynskist broytt. Enn eri hagtølini fyri virkandi samstarvið ikki tøk.

Undirskriva:

Miðja eigur at verða eftir, at koma við ítøkiligum uppskotið til broytingar í leypi av 2015.

**3) Mál nr.: 14/00148** Betri heilsutænastu til borgarar í Suðuroynni

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram teldupost dagfestur 1. oktober 2014 frá heilsumálaráðnum viðv. leisti til tess at betra um heilsutænasturnar til borgarar í Suðuroynni.
Somuleiðis viðfest uppskot til samstarvsavtalu dagfest 1. oktober 2014.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt at taka undir hesum.

Undirskriva: